## DAGSINS MEINING

# Bumbaðar aftur í tíðina

Nógv rok stendst av støðuni hjá nýggja innlendismálaráðharranum, nú hann hevur gjørt føroyska ítróttarheiminum greitt, at hann treyðugt vil loyva nøkrum sum helst útlendingum til landið. Væl at merkja útlendingum, sum ikki hoyra heima í norðanlondum.

Undanfarna landsstýri hevði annars í hyggju at gera greiðari mannagongdir á økinum. Greiðari mannagongdir, sum í størstan mun høvdu eina afturhaldandi ávirkan, men sum hinvegin loyvdi ávísum bólkum eina smidligari skipan. Eitt nú arbeiðsfólk við servitan innan sítt øki og ítróttarfólkum.

At nýggi innlendismálaráðharrin hevur eina aðra støðu í hesum, og ikki vil loyva ítróttarfólkum upp í serliga bólkin, má so vera hansara søk, men tað má standa púra greitt, at hetta fer at kosta føroyskum ítrótti nógv. Bæði fíggjarliga, tí við nýggju mannagongdunum verður talan at kalla um yrkisítrótt, og tað hava feløg at kalla ikki ráð til. Og ítróttarliga, tí tá feløgini hava ráð til færri útlendingar, verður talan um lægri støði á ítróttinum.

Piotr Krakowski og Wieslaw Zakrewski mest sum revolutioneraðu føroyskan fótbolt í allari framtíð, tá teir í 1989 vóru við til at seta B71 á fótbóltskortið. Costin Dumitrescu, Ioana Rápa við fleiri hava havt avgerandi ávirkan á endurvunna popularitetin hjá hondbóltinum. Marina Popovic, Bobo og Borco Ilic hava skapt eina veruliga breidd í flogbóltinum kring landið. Og hvussu stór hevði framgongdin hjá føroyskari talvítrótt verið, var tað ikki fyri Ivan Sokolov. Ein av heimsins bestu telvarum, sum eitt skifti búleikaðist her hjá okkum.

Tað er einki at ivast í, at hesir persónar – og nógvir við teimum – í stóran mun hava drigið føroyskan ítrótt risafet framá. Bæði hvat viðvíkur hugburði til ítróttina og ikki minst sum inspiratiónskelda við nýggjum venjingarhættum, nýggjum spælistíli og framúrskarandi einmansavrikum. Tey hava verið fyrimyndin hjá hópin av ungum ítróttafólki og soleiðis eggjað hesum til at leggja enn meira fyri í dagligu venjingini. Alt nakað, sum hevur verið føroyskari ítrótt at stórum gagni.

Skal alt hetta nú verða søga, tí politiski viljin ikki vil hava hesi fólk í landinum? Tað eru ikki hesi fólk, sum hava skapt nakra spírandi kreppu á arbeiðsmarknaðinum. Heldur hevur tað verið politiska stýringin – ella mangul upp á somu – sum ikki hevur virkað sum ein regulator av búskapinum. Og sum tí ikki hevur kunnað gjørt sveiggini í búskapinum minni og bleytari. Nakað, sum annars vanliga plagar at vera aðalmálið fyri búskaparstýringini í einum og hvørjum landi.

Eitt er, at almennu Føroyar nú royna at avmarka innflutningin av fremmandari arbeiðsmegi, men at skera alt yvir ein kamb og siga, at útlendsku ítróttarfólkini eru ein trupulleiki fyri samfelagið, er langt úti. Ískoytið, sum hesi geva okkum, man hava fleirfalda virði av tí arbeiðinum, sum tey – møguliga – taka frá føroyskum hondum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ikki er lætt at spáa um framtíðina

**Helgi Abrahamsen**



Kai Vágfjall skrivar í Dimmalætting tann 30. mars, at tað er ikki sørt, at eg havi havt hug at gera gjøldur burturúr Knúti Eysturstein í blaðkjakinum, sum hevur verið okkara millum hesa seinastu tíðina. Hetta harmar meg, tí er tað nakað eg ikki ynski, so er tað at gera gjøldur burturúr teimum, sum hava eina aðra hugsjón enn eg havi sjálvur. Sjálvandi skulu fólk hava loyvi at vera tjóðveldisfólk, sjálvt um eg eri sambandsmaður, og sjálvandi hava eg og Knút Eysturstein loyvi at kjakast í bløðunum, uttan at tað merkir, at vit gera gjøldur burturúr hvørjum øðrum.

Men eftir at hava sagt hetta, roynir Kai Vágfjall sjálvur at gera gjøldur burturúr mær, við at seta mínar spurningar inn í orðatakið "ein býttur kann spyrja meira enn ein vísur kann svara" (orðatakið sigur annars TÍGGJU vísir, men sama ger. - Higartil hevur tað hvørki eydnast at fáa ein ella tíggju fullveldismenn at svara mínum spurningum).

Kai Vágfjall sigur í greinini, at tað ber snøgt sagt ikki til at svara spurninginum, hvussu eitt føroyskt fullveldi skal fíggjast. - Tað var løgi !

Vit hava síðani 1999 fingið Hvítubók, "íslendsku tølini", og sokallaðar "kravsgreiningar", og harafturat hava embætismenn og politikarar ferðast land og ríki runt, fyri at sannføra Føroya fólk um, at við 15 - 20 ára skiftistíð og tveimum prosentum í búskaparvøkstri, er eingin trupulleiki at fíggja eitt fullveldi. Og nú fáa vit at vita frá einum fullveldismanni, at tað ber als ikki til at gera slíkar útrokningar.

Men kanska hevur Kai rætt í tí, at tað er hóast alt ikki so lætt at spáa um framtíðina. Tann sokallaða "kravsgreiningin", sum løgtingsmenn fingu frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum í 2001, hevði framskrivingar heilt fram til ár 2016. Men longu í 2003 er landskassaavlopið meira enn 200 mió. krónur lægri, enn varisligasta metingin í kravsgreiningini vísti. - So tað er ikki undarligt, at Tjóðveldisflokkurin vildi sleppa í andstøðu, sum støðan var vorðin.

### Nógvir feilir í greinini

Annars eru nógvir feilir í greinini hjá Kai Vágfjall. Til dømis sigur hann tvær ferðir, at blokkstuðulin er 600.000 krónur, hóast rætta talið er meira enn túsund ferðir so høgt (630 mió. krónur). Av hesum peningi sigur Kai, fer ein partur til tað hann kallar "rindan fyri donsk áhugamál her á landi", og sipar hann til rentur og avdráttir av lánum, sum føroyski landskassin skyldar í Danmark. Men hví skylda vit dønum- og ikki onkrum øðrum pengar? Svarið finna vit millum annað í eini grein, sum Kai Vágfjall sjálvur hevði í bløðunum fyri 4 árum síðani. Í henni segði hann, at danska stjórnin tók alla uttanlandsskuld okkara uppá seg. Tí skylda vit teimum pengar!

Um vit ímynda okkum, at danir ikki høvdu hjálpt okkum við lániskuldini, so hevði Kai ikki kunnað kallað tað donsk áhugamál. Men spurningurin er, um vit høvdu verið ríkari av tí ? - Eg haldi ikki.

### Landsbankin fullur av blokkstuðli

Síðani sigur hann, at sambandslandsstýrið hevur kunngjørt, at teir ætla at "ræna pening, sum undanfarna samgonga hevur spart upp í Landsbankanum". Til hetta er at siga, at Tjóðveldisflokkurin hevur eisini gjørt eitt fíggjarlógaruppskot, sum vísir 99 mió. krónur í halli, umframt at 77 mió. krónur skulu gjaldast í avdráttum. Hevur Kai Vágfjall kannað eftir, hvar Tjóðveldisflokkurin ætlar at fáa hesar 176 milliónirnar frá, um tær ikki skulu takast úr Landsbankanum? Og hevur Kai Vágfjall roknað út, hvussu stórt hallið hevði verið á fíggjarlógaruppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum, um eingin blokkstuðul var, og inntøkurnar tí vóru 630 mió. krónur lægri enn tær eru? Og hevur hann roknað út, hvussu langa tíð tað hevði tikið at tømt Landsbankan, um hesi tølini vóru veruleiki?

Kanska skuldi Kai Vágfjall eisini roynt at roknað út, hvussu nógv undanfarna samgonga hevði klárað at spart upp í Landsbankanum, um inntøkurnar í árunum frá 1998 til 2003 høvdu verið 5.092 mió. krónur (sum svarar til blokkstuðulin hesi árini) lægri enn tær veruliga vóru.

### Eingin niðurgering av føroyingum

Einastaðni í greinini sigur Kai Vágfjall soleiðis um mínar blaðgreinar: "Skrivingin hjá hesum erka sambandsmanni, er, sum ikki einaferð, ein niðurgering av føroyingum, sum einki nytta, einki duga o.s.fr." Eg fari at enda við at spyrja Kai Vágfjall, um hann kann vísa á nakran setning sum eg havi skrivað í bløðunum, har føroyingar verða niðurgjørdir, ella har eg sigi, at føroyingar einki nytta ella einki duga?

Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Nú drepa teir niður á rættini

**Hergeir Nielsen**



Tað eru bara heilt fáir dagar síðan, vit høvdu løgtingsval, og tá flutti heili 20% av andstøðuni hendanvegin.

Teir søgdu suðringum, at undanfarna samgonga einki hevði fingið av skafti, og at teir skuldu gera alt so nógv betri fyri oyggj okkara, tað sokallaðu háborgina hjá javnaðarflokkinum.

Teir komu, sóu og sigraðu - og so fóru teir avstaðaftur.

Nú hava teir so gingið fjøllini, eisini her um okkara leiðir, og eru farnir at drepa niður á rættini.

### Miðnámssskúlin- ein skerdur fuglur

Undir valstríðnum boðaði javnaðarflokkurin frá, at hann toldi ikki, at miðnámsskúli varð bygdur í Vági. Ja, vit høvdu klovið teimum oynna, søgdu tey í javnaðarflokkinum og harmaðust um, at vit ikki í staðin umvældu gamla kommunukontórið til endamálið, so sum tey høvdu skotið upp.

Vit ætlaðu hinvegin, at miðnámssskúlin í Vági skuldi gerast nakað heilt serligt fyri ungdómin í Suðuroynni. Hann skuldi harafturat verða eitt tilboð til ungdóm uttaneftir eisini.

Skúlin verður nú bræddur niður. Hann verður ein skerdur fuglur, ið als ikki fær tað flog yvir sær, sum vit ætlaðu honum.

Vit høvdu játtað honum 6 mió.kr. hetta fíggjarárið, men teir hava nú skorið hann niður við 25%, og harafturat hava teir strikað meginbókasavnið.

Ein høvuðsmaðurin fyri hesum slátrinum er Jacob Vestergaard, ið sum borgarstjóri hevur slóðað undan og forða einum kommunalum samstarvi á hesum øki. Nú fólkaflokkurin fekk ræði á mentamálum var harafturat skjótt at fáa lívið av meginbókasavninum, og so varð gjørt.

Saman at halda var ei okkum givið. Kommunalt samstarv í Suðuroynni stó ikki royndina. Tey mest felagskommunalu omanfyri hálsvølin vendu ranguna út, og blakaðu aftur ein tann stórsta møguleikan fyri mentanarligum ávøkstri, ið suðringum kemur at standa i boði í fleri tíggjuára -skeið framyvir.

### Gransking

Tað er farið at loysa seg at senda fisk til Kina, og fáa hann skornan aftur fyri væl minni, enn vit sjálvi kunnu skera hann fyri.

Henda gongd setur stór krøv til okkara, og allir møguleikar fyri eini skilabetri úrtøku eiga at verða kannaðir.

Í øllum vesturheiminum er dentur lagdur á, at gransking, menning av vitan, tøkni os.fr. er vegurin fram, men orðaskiftið á tingi um fíggjarlógini segði okkum, at menn óttast gransking og framburð.

Granskingardepilin fyri økismenning skipaði fyri stak áhugaverdum fundi í Vági fyri 3 vikum síðan um gagnnýtslu av fiski - og fiskaúrdráttum. Greidliga kom fram týdningurin av gransking í gørnum oø., sum annars fer burtur.

Hesin fundur var ikki nakað fyri samgongumenn. Teir møttu ikki og høvdu ongan áhuga fyri hesum fundi. Undir viðgerðini av fíggjarlógini vildi formaðurin í vinnunevndini harafturat ikki so mikið sum hoyra talan um nakra játtan til gransking yvirhøvur.

Meðan íslendingar granska á høgum stigi og brúka heili 2% av BTÚ til at menna og virðisøkja fiskatilfeingi, hevur samgongan skorið alla granskingnið niður, og í staðin mannað ein serligan bólk av sokallaðum suðuroyatingmonnum.

Allur heimurin heldur nú ondini, til hesin heilatrusturin kálvar og sigur okkum, hvussu russarafiskur kann flytast umvegis landskassan til Vágs, og síðani aftur hagar, hann kom, samstundis sum vit ikki hava ráð at nerta okkara egna fisk.

Kinasyndromið, sum loypir skelk á heimsbúskapin, sæst hava fingið ein føroyskan mótpart.

### Granskingardepilin í Vági slaktaður

Granskingardepilin í Vági slakta teir í einum høggi. Hetta er tann einasti av slagnum, sum er í Suðuroynni, og vit ætlaðu at menna hann enn meira. Men so skuldi ikki verða.

Javnaðarflokkurin fekk tað vald hann bað um, og enn eitt framtak um okkara leiðir verður sópað burtur úr oynni í einum nosi, og vit vera tey 4 almennu størvini fátækari.

Ætlanin var at knýta enn fleiri ungfólk, suðringar við hægri útbúgvingum, at hesum stovni, men nei. Tað verður ikki tolt, at almenn størv, ið krevja útbúgving, finnast í syðru helvt av Suðuroynni. Alt, sum luktar av framburði, skal tyrvast í modnaroyki..

3 størv í Skørðunum í Porkeri fóru fyri mánaði síðani, og roknað verður við, at eini tvey størv rúka á almanna- og toll- og skattstovuni á Tvøroyri.

Morðgírigir menn eru setstir við reyðu knøttarnar, og náði finst eingin.

Granskingardepilin er skerdur við fleiri enn 30 % við tilvísing til, at hetta er sjálvur lønarparturin. Allir aðrir stovnar í landinum halda fram við sama lag. Tann einasti av teimum, sum liggur íVági verður slaktaður. Hví?

Hetta eru einastu størv við hægri útbúgving, sum eru komin til Vágs í nýggjari tíð frásæð Miðnámsskúlanum.

Greitt er, at teir partar av landinum, sum hava bjóðað fólki við hægri útbúgvingum størv, hava ment seg skjótast.

Suðuroyggin hevur hinvegin bara havt fiskivinnuna á dúva á, og hevur hetta eisini merkt, at ein einvegis burturflyting av ungfólki hevur verið av oynni. Nøkur venda aftur, men tey við hægri útbúgving búseta seg aðrastaðni.

### Suðuroyingar hava ikki skil fyri umsiting

Søguliga sjáldsom uppskot vóru viðgjørd á tingi um dagarnar, men eisini her varð dripið niður, so skjótt menn vóru komnir á rætt.

Teir tríggir sokallaðu suðuroyatingmenninir blóðgaðu knívarnar og forðaðu saman við øðrum samgongumonnum fyri, at umsitingin av Strandfarskipum Landsins kundi flytast til Suðuroyar. Ikki talan um nøkur almenn størv til suðringar, søgdu teir ráðandi.

Formaðurin í vinnunevndini fór enntá so langt, at hann noktaði fyri einari sámuligari nevndarviðgerð av málinum.

Í øðrum lagi skutu vit upp, at suðringar sluppu at umsita Smyril. Ikki talan um, søgdu suðuroyartingmenninir í samgonguni. Teir vóru skjótir á reyðu NEI-knøttunum og skutu niður allar møguleikar fyri, at suðringar sluppu so frægt sum at umsita sína egnu ferju.

Eiðasørir fyri hugskotum vóru teir sjálvir í andstøðu, og púrgeldir í samgongu síggja teir niðurbrótingina av Suðuroynni sum eina uppgávu í sjálvum sær.

### Skattalættin fíggjar tað sum manglar í

"Ábyrgdarloysi" er eitt hugtak, sum ofta verður nýtt í politikki.

Orðið er munandi meira álvarsamt enn mangur gevur sær far um. Hinvegin er torført at finna nakað annað heitið fyri tí politikki, sum henda samgonga hevur sett sær fyri at reka.

Vit skulu hava eina kvart mia. kr. í halli á fíggjarlógini, siga teir í fyrsta lagi.

Í øðrum lagi siga teir, at tey sum hava serliga góð ráð at fíggja hallið, skulu sleppa undan.

Og í triðja lagi siga teir ikki so nógv, men fara sum tjóvar á nátt eftir innistandandi, sum vit løgdu eftri okkum, at fíggja ein politikk, sum teir ikki hava dirvið til at rinda fyri sjálvir.

### Okkara fíggjarlóg

Í okkara upppskoti til fíggjarlóg hava vit dirvi til at reka politikk.

Vit vilja fjálga um útjaðaran, miðnámsskúlan, gransking og Vágs havn, og og tað sæst aftur í uppskoti okkara.

Havnir og vegir, sum vit hava givið tilsøgn til, halda vit fast um, og strika ikki hesa íløgur, so sum samgongan ger í fleiri førum. Ella rættari sagt bert í teimum førum, har teir kunna vinna okkum suðuroyingum neisir.

Vit vildu hildið áfram móti einum sjálvberandi búskapi, men hesir trokaðu okkum av, og skuldu gera alt so nógv betri.

Einki, absolutt einki, bendir tann vegin - tíverri.

# Ólavsøka í Keypmannahavn

### Eisini føroyingar í útlegd varðveita føroyskan sið

Eftir at Martin Fjallstein leiðari í Føroyahúsinum í Keypmannahavn hevur tikið stig til at samla fólk frá fleiri av feløgunum í Keypmannahavnarleiðini, er ein arbeiðsbólkur nú settur til at kanna møguleikarnar fyri at halda ólavsøku á økinum í og uttan fyri Norður Bryggjuna á Grønlands Handelsplads í Keypmannahavn.

Hugskotið er komið, tí tað nú er eitt stað, ein miðdepil, har tað er møguligt at halda eitt ólavsøkulíknandi tiltak. Hetta er møguligt í og uttan fyri Bryggjuna. Til ber at rógva kapp á sjónum fram við Bryggjuni, hava ymisk tiltøk til gaman á sjálvum bryggjuøkinum framman fyri Bryggjuna og hava onnur mentanartiltøk í sjálvum húsinum. Í stuttum kann sigast, at umstøðunar eru til góðar, nú føroyingar og aðrir norðbúgvar hava fingið ein framm úr góðan miðdepil, har tey kunnu samlast til álvara og gaman. Bæði Trygvi Johansen, leiðari á Føroysku Viðskiftastovuni í Keypmannahavn, og leiðarin á Norður Bryggjuni, Morten Melgaard taka undir við og stuðla tiltakinum.

Fyrstu fundirnir hjá arbeiðsbólkinum hava longu verið. Ymisk tiltøk hava verið løgd framm, og arbeiðsleiðarar eru settir til at



kanna møguleikanar fyri at fáa tiltøkini upp á beinini og síðani skal ein ætlan gerast fyri at fáa tey mongu tiltøkini gjøgnumførd.

Royndirnar hjá fólkunum, ið skulu fáa tiltøkini í lag, so at tað eydnast at fáa eitt stórsligið og vónandi væleydna tiltak, er í lagi. Í arbeiðsbólkinum eru fólk, sum í sínari tíð vóru við til at fyrireika tiltakið Føroyar í Fokus, fólk, sum hava staðið fyri øðrum tiltøkum, m. a. føroyska ískoytinum til Keypmannahavn sum Kulturby ´96, Nordatlantisk Kultur Festiaval í 2002 og tað árligu Atlantic Airways Færø Regatta í Ishøj Havn, sum í ár verður hildin fyri 17. ferð á rað. Alt tiltøk, har tað hevur verið um Føroyar, føroyska mentan, føroyskt fólkalív og føroyskt vinnulív.

Sjálvandi kann eitt tiltak av hesum slag ikki fáast í lag einans við tí stóra áhuga og arbeiðságrýtni, sum øll í arbeiðsbólkinum vísa. Krónur og oyru skula eisini fáast til vega. Nøkur tiltøk geva pening og hvíla í sær sjálvum, onnur krevja peningaligan stuðul. Her kann nevnast, at danir síggja føroyingar í Danmark og tað, tey umboða, sum góða umboðan fyri Føroyar, føroyska mentan og føroyskt vinnulív.

Arbeiðsbólkurin heldur tað tí vera eina sjálvfylgu at venda sær til føroysku myndugleikarnar, føroyska vinnulívið og norðurlensku samarbeiðsfeløgini til tess at fáa peningaligan stuðul til eitt ólavsøkutiltak á Norður Bryggjuni í Keypmannahavn. Eitt tiltak, sum vónadi verður ein fastur árligur táttur, so føroyingar í Danmark stoltir kunnu siga:" Eisini føroyingar í útlegd varðveita føroyskan sið".